


*Meistararnir úr B36 vóru einasta liðið, sum megnaði at vinna allar heimadystirnar, og ivaleyst var hetta lykilin hjá teimum til gullkrónurnar, sum teir fingu handaðar í Vági sunnudagin*

# Tað er dýrt at tapa á heimavølli

**Meistararnir í B36 eru teir einastu, sum allar níggju ferðirnar eru farnir av heimavøllinum við fullari úrtøku**

SAMANUM
*Jóannes Hansen*

Fótbóltsárið 2001 er mest sum av – í hvussu so er heima á landi. Í altjóða høpi eru fleiri uppgávur eftir. Í hesi vikuni eru meistararnir í kvinnufótbólti í fjør (við meistaraskapinum í ár hava tær longu kvalifiserað seg til kappingina um eitt ár), KÍ, í Finnlandi, har tær fyri fyrstu ferð royna seg í Europa Cup.

Leygardagin skal landsliðið spæla síðsta HM undankappingardystin. Tað verður í Slovenia. Síðst í mánaðinum skulu Jógvan Martin Olsen og tveir av spælarunum, sum í morgin fara til Slovenia, aftur niður á Balkan. Tað skulu teir, tá U–19 landsliðið skal spæla í EM undankapping. Tann kappingin verður eisini í Slovenia, og U–17 landsliðið hjá Mattiasi Davidsen skal eisini royna seg uttan fyri landoddarnar í EM undankapping. Tað verður 17. og 19. oktober, tá møtstøðulondini verða Sveis og Wales.

Heima á landi er fótbóltsárið næstan av. Einastu dystirnir, sum eru eftir, eru teir ímillum B71 og Skála. Tey skulu komandi tveir leygardagarnar spæla um eitt pláss í bestu deildini, og so skulu KÍ og Royn komandi leygardag spæla seinna dystin um eitt pláss í næstbestu deildini. Dysturin í Hvalba síðsta leygardag endaði 1–1, so har er púra opið.

## Bronsuspenningur

B36 var meistari, tá teir fóru til Vágs. Teir fóru suður fríggjakvøldið, tí teir ynsktu at vera væl fyri og enda árið við manér, men tað kiksaði. Sinniliga og likamliga yvirskotið, sum skal til at vinna ímóti hinum oddaliðunum var ikki har. Vágbingar høvdu yvirskotið, teir vunnu, og eina løtu tóktist tað, sum um teir høvdu vunnið bronsumerkini, sum FSF hevði latið býráðsformanninum í Klaksvík. Í FSF mundu teir ikki rokna við, at bæði B68 og B36 fóru at tapa.

Men tað var hetta, sum sá út til at gerast veruleikin. B68 átti síðstu royndina í Klaksvík, og tað eydnaðist at javna til 2–2. Spenningurin um bronsukrónurnar var so stórur, sum hann ikki hevur verið um gullkrónurnar síðani 1994, tá GÍ skoraði í síðstu løtu. Tað var eisini í Klaksvík, og tá vóru tað teir í HB, sum vóru vónsviknir. Mest spennandi síðsti leikdagurin í bestu deildini mundi vera í 1987, tá tað í allar síðstu løtu varð greitt, at TB var meistari, meðan HB og GÍ vóru vónbrotin.

## Vágamenn siga farvæl

FS Vágar flutti leygardagin niður í 2. deild. Teir sprellaðu fyrstu løtuna og fingu mál, men tað var ikki nóg mikið ímóti HB, sum hóast vánaligasta kappingarárið nakrantíð var væl betri, enn niðurflytararnir vóru.

Annar av FSV venjarunum, Albert Ellefsen, segði í útvarpinum fríggjadagin, at uttan mun til, hvar FSV fór at spæla komandi ár, so fóru teir at vera betri fyri, enn teir hava verið í ár. Eftir dystin leygardagin endurtók Albert tað, sum hann ofta hevur sagt um, at tað krevst ein hugburðsbroyting til í Vágum, um FSV skal standa seg. Hann vísti á, at Vágoyggin altíð er niðast í ítrótti. Í fótbólti og hondbólti er nakað um hetta, og í øðrum ítróttargreinum hevur tað ofta eisini roynst soltið. Men flogbóltskvinnurnar í Drátti hava seinastu árini víst, at tað ber til hjá teimum í Vágum at standa seg í kappingini við tey bestu, og tað sama hava onkrar kappróðrarmanningar har vesturi gjørt.

Roynd in við útlendskum venjara í fjør og í ár miseydnaðist fullkomuliga. Ivaleyst verða tað lokalar kreftir, sum skulu standa á odda, tá FSV fer at gera eina nýggja roynd at koma ímillum tey fremstu, og tað áttu at verið góðar vónir fyri, at tað fer at eydnast. Kappingarneytarnir vera ÍF, Sumba, LÍF, Skála ella B71 og kanska Royn.

## Heimavøllurin týdningarmikil

Tað verður ofta tikið til, at um tú skalt hugsa um at vera við í kappingini í toppinum, so er alneyðugt at vinna allar dystirnar á heimavølli. Gongdin í júst lokna kappingarárinum undirstrikar hetta.

Meistaraliðið úr B36 er tað einasta, sum hevur vunnið allar níggju dystirnar á heimavølli. GÍ tapti 1–0 í Sarpigerði ímóti NSÍ, og teir megnaðu bara 1–1 á heimavøli ímóti VB. Høvdu teir havt hesi fimm stigini fleiri, so hevði meistaraskapurin endað í Gøtu og ikki í B36. Og so kunnu vit meta um, hvussu tað hevði spælt av í Vági leygardagin, um B36 hevði havt knívin á barkanum.

Vágbingar iðra seg sjálvandi um, at triðja plássið glapp teimum av hondum í evstu løtu. Tá teir líta aftur á kappngarárið fyri at minna seg á, hvar teir kundu havt vunnið tað stigið, sum leygardagin restaði, so minnast teir ivaleyst 2–1 heimatapið ímóti KÍ og heimatapið ímóti GÍ, sum vann 2–1 í Vági. Men teir iðra seg ivaleyst mest av øllum um, at teir síðstu átta minuttirnar í Miðvági mistu øll stigini.

Toftamenn hava eisini søplað á heimavølli. Teir taptu 2–0 ímóti B36, teir taptu 4–1 ímóti VB, og teir spældu 2–2 ímóti GÍ.

HB hevur ongantíð í nýggjari tíð havt eitt so vánaligt kappingarár sum í ár, og tað er sjáldan komið fyri, at KÍ ikki hevur verið omanfyri miðjuna. HB í Gundadali og KÍ í Klaksvík plaga at vera ov stórir bitar. Men í ár hava bæði KÍ og HB bara vunnið fýra heimadystir.

## Fyrireikingarnar

Vit hava fyrr í heyst nevnt, at sjøtul langt síðani er settur á fyrireikingarnar til komandi kappingarár og harvið kappingin um FM heitið og Europa Cup luttøku.

Sáttmáli er ikki undirskrivaður millum Piotr Krakowski og B36, men tað hevði verið undarligt, um samstarvið ikki helt fram. Ivaleyst skulu teir í meistarafelagnum eitt sindur longri niður í lumman, men tað hava teir ráð til, nú milliónin frá UEFA er meiri enn í eygsjón (sjálvt um hon ikki verður útgoldin fyrrenn á sumri í 2003.

B68 spennir bogan við nýggjum høvuðsvenjara, og í Gøtu, í Runavík, í Vági og í HB sigast venjaraviðurskiftini vera komin upp á pláss. Í Sundalagnum sigast viðurskiftini vera komin í rættlag. Í Klaksvík bíða teir, og á Sandi, á Skála og á Tvøroyri hava teir av góðum grundum einki gjørt enn.

Kappingin um spælararnar er stór. Ítróttarsosialurin fer at fylgja við. Men higani fara vit at takka øllum fyri eitt gott kappingarár. Ikki minst góðu heimildarfólkini kring landið fáa eina heilsu.






# Lykilin til greipuna

**Tað eru sjálvsagt fleiri orsøkir til, at B36 í ár kann rópa seg bæði føroyameistara og steypavinnara, men fyrsta og fremsta av hesum er uttan iva, at liðið í ár hevur havt sterkasta leikarahópin**

MEISTARAR
*Jákup Mørk*

At B36 á komandi landsliðsferðini eigur seks mans í hópinum hjá Allani Simonsen, sigur ikki so lítið um, hví liðið í ár gjørdist ein sannførandi føroyameistari, tó at teir leingi fingið ógvuliga harða kapping um oddasessin frá gøtumonnum.

Størsta styrkin hjá felagnum í ár hevur uttan iva verið stjørnusetti hópurin, sum longu undan kappingarársbyrjan viðførdi, at tey allar flestu longu tá peikaðu á árstalsfelagið sum ein ivaleysan komandi meistara. Soleiðis var eisini í blaðnum, Fótbóltur 2001, sum Sosialurin gav út undan kappingini, har fimm út av fimm frásøgufólkum innan fótbóltin peikaðu á B36.

## Hali Hallo

Kanska einasta plássið, har B36 ikki hevði nakra veruliga stjørnu, var málverjasessurin, sum av mongum hevur verið mettur sum ein trupulleiki, síðani Egin Høgnesen fyri tveimum árum síðani segði endaliga farvæl.

Eitt nú byrjaðu teir árið í fjør við einum dagslongum leigumáli av Jens Martini Knudsen, men síðani tá hevur eingin ivi kortini verið um, hvør eigur plássið. Tróndur Vatnhamar hevur ment seg við risafetum hesi bæði árini, og sæð burtur frá dystinum á Toftum – tá var hann sjúkur – hevur Tróndur verið í málinum allar dystirnar.

Eisini hevur hann so við megnað at sannført síni egnu um, at hann er rætti maðurin til plássið, og lítið er at ivast í, hvør fær størsta klappikórið, tá leikaranøvnini verða rópt til heimadystirnar. Við inspiratión frá einari ávísari sjónvarpsreklamu plagar vallarvarparin at rópa »í málinum við nr. 16. Hali-Hallo Tróndur Vatnhamar!«.

## Stinna verjan

Nú gjørdist umrøðan av málverjanum kanska heldur drúgv. Framman fyri málverjan er eisini ein hin sterkasta verjan í landinum. Eftir at fyrstu dystirnir vórðu nýttir til at finna røttu blandingina, hevur Egil Zachariasen verið stýrimaðurin her, og aloftast hevur tað verið til reint UG. Hann er kanska ikki hin mest eleganti leikarin, men hann er kropsliga sterkur, og tann skjótleikan, sum hann ikki hevur í beinunum, hevur hann hinvegin í høvdinum.

Framman fyri seg hevur sweeparin aloftast havt tveir landsliðsmenn í Pól Thorsteinsson og Arnbirni Danielsen, og slíkir menn nýtast helst ikki nærri umrøðu. Skaðar og leikbann hava tó eisini viðført rokeringar her, og tá hava fyrst og fremst Herbert í Lon Jacobsen og Fróði Clementsen prógvað, at teir avgjørt eru leikarar, sum roknast kann við í framtíðini.

## Miðvøllurin er hjartað

Hjartað á øllum liðum er sjálvandi miðvøllurin. Tað er aloftast her, at dystir verða vunnir ella taptir, og hjá B36 hevur talan í ár aloftast verið um sigrar.

Ofta verða teir sonevndu skrellimenninir á miðvøllinum undirmettir. Tað eru ikki teir, sum syrgja fyri teimum vøkru detaljunum, ella týdningarmiklu málunum, men fyri venjararnar er tað av alstórum týdningi við hesum leikarum.

Piotr Krakowski hevur í ár verið í teirri hepnu støðu, at hann hevur átt ikki færri enn tveir av hesum, og báðir hava teir verið millum mest støðugu leikararnar hjá B36 í ár. Talan er sjálvandi um Jan Guttesen og Klæmint Matras, sum hvør í sínum lag hava arbeitt sum hestar í at kalla hvørjum dysti, og harvið syrgt fyri, at fortreytirnar hjá hinum á liðnum hava verið í lagi. Jan hevur longu í fleiri ár verið millum týdningarmiklastu leikararnir hjá B36, og hóast fleiri hava nevnt hann sum landsliðsevni, so er hetta tó ongan tíð vorðið veruleiki. Tað er tað hinvegin longu nú hjá Klæminti, sum verður við á komandi Sloveniaferðini. Eisini er í hesum sambandi merkisvert, at hóast teir báðir ígjøgnum árið hava verið í einum ótali av nærdystum, so teir til samans bert fingið seks gul kort, og tað sigur eisini nakað um fótbóltsligu dygdir teirra.

Í borðunum hava skiftandi leikarar verið nýttir. Í høgru fyri tað mesta Kenneth Jacobsen og Bjarni Prior. Av hesum hevur Bjarni havt hægsta dystartalið, men sum árið hevur liðið, hevur tað tó verið Kenneth, sum hevur sett seg alt tyngri á plássið.

Vinstru megin hava fyri tað mesta Jens Kristian Hansen og Magni á Lakjuni roynt seg, tó at Heðin á Lakjuni eisini hevur verið at sæð við hvørt. Av teimum báðum fyrru hevur Jens Kristian uttan iva størsta týdningin. Ikki minst tí góða medvit hansara fyri spælinum ger hann nýtiligan á somikið nógvum plássum, soleiðis at hann eisini hevur verið sentralt á miðjuni, umframt at hava spælt í verjuni.

## Rómin á køkuni

Álopsmaskinan hjá B36 hevur sum oftast verið hon, sum hevur fingið yvirskriftirnar fram, tá teir tríggir landsliðsmenninir, John Petersen, Jákup á Borg og Heðin á Lakjuni hava sett ferð á. Allir hava teir hvør sínar dygdir, og tað at spælistílur teirra er somikið ymiskur, hevur eisini viðført, at tað hevur torført hjá mótstøðumonnunum at finna nakað einstakt trekk, til tess at steðga liðnum.

At siga akkurát, hvør teirra hevur havt størstan týdningin, er nærum ein ógjørlig uppgáva. Onkur vildi kanska sagt evnini hjá John at halda bóltinum, vóru tey týdningarmesti. Onkur annar vildi hildið ídnið og frekleikin hjá Jákupi, meðan ein triði kundi sagt, at skjótleikin hjá Heðini ofta hevur verið lykilin.

Hvussu er og ikki, so hava teir tríggir til samans verið vandamesta álopsmaskinan í landinum hetta árið, og hava avrik teirra verið av alstórum týdningi fyri endastøðuna hjá liðnum.

## Nakrir eru ávegis

Umframt omanfyri nevndu, so hevur B36 í ár eisini havt ein bonk, sum er somikið sterkur, at maður altíð er komin í mans stað, umframt at neyðugu – og ofta avgerandi – útskiftingarnar kundu gerast, tá nógv stóð á.

Áki Mørk, Niels Joensen, Rene Tórgarð og Heini í Skorini eru allir ungir leikarar, sum eru uppaldir í felagnum, og allir hava teir prógvað, at teir avgjørt eiga at roknast við, tá eitt framtíðar B36 lið skal setast saman. Ikki minst høvdu Áki og Niels í tveimum førum avgerandi leiklut, tá B36 togaði teprar sigrar í land móti ávíkavist B68 og FS Vágum.

At enda skulu so eisini nevnast Eyðun Højgaard og Ronnie Samuelsen, sum báðir vóru við í hópinum fram til summarsteðgin, men sum tó ikki fingu nakað gullmerkið.